Vágs Kommuna

# Fíggjarleiðari til Vágs kommunu

Søkt verður eftir fíggjarleiðara til Vágs kommunu at byrja skjótast tilber.

**Talan er um eitt áhugavert fulltíðarstarv og fevnir um at fyrisita m.a.:**

- dagliga bókhalds-, roknskapararbeiði og avstemming.
- umsita og avstemma ognara-og skuldarabókhaldið.
- ábyrd av at innkrevja útistandandi.
- uppseta mánaðar- og ársroknskapir og fíggjarætlanir.
- fíggjarstýra lán og innistandandi.
- menna mannagongdir og edv v.m á fíggjarliga økinum.
- ráðgeva í fíggjarligum viðurskiftum.
- annars alt vanligt skrivstovuarbeiði.

Allar skrásetingar verða dagliga førdar á teldu, tí er tað avgjørt neyðugt, at umsøkjarin hevur góðan praktiskan og teoretiskan kunnleika til skrivi-, rokni-, roknskapar-, og telduarbeiði.

Fyri ein, ið kundi hugsað sær eitt sjálvstøðugt og fjøltáttað arbeiði, ið setur stór krøv til tann menniskjansliga og fakliga førleikan, er hetta tað rætta starvið.

Hevur tú áræði, kann virka sjálvstøðugt, góð samstarvsevni og hevur hollar royndir innan bókhalds-, roknskapar-, og fíggjaryrki, við ástøðiligari útbúgving, eitt nú HA, HD ella aðra viðkomandi útbúgving, so er tú tann vit søkja.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya (KAF) og Starvsmannafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Petry ella Kirstin á telefon 37 30 24.

Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum og ummælum verður at senda inn áðrenn 11. februar 2008 kl. 12.00.

Vágs kommuna tilskilar sær rætt til at lýsa starvið leyst av nýggjum, um ov fáir umsøkjarar eru til starvið.

*Vágs kommunu*
*Vágsvegur 22*
*FO-900 Vágur*
*Viðm. Fíggjarleiðari*

Røktar- og umlættingarheimið

Lágargarður

# Starvsfólk til Lágargarð

**Avloysari til dagstovnin**
Lýst verður eftir fólki til dagstovnin á Lágargarði við serligum áhuga og hegni innan handaverk, og við førleika innan aktivering skjótast til ber.

Talan er um eitt farloyvisstarv til 31. desember 2008.

Arbeiðstíðin er 40 t/vikuna ella eftir nærri avtalu.

Starvið er lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

Á dagstovninum eru 36 heimabúgvandi pensionistar um vikuna saman við búfólkunum, ið eru 48 í tali, sum fáa tilboð um bæði ítriv og venjing.

Væntað verður, at umsøkjarar hava góð samstarvsevnir og kunnu arbeiða sjálvstøðugt.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja til Marjuna Poulsen, virkandi leiðara á dagstovninum, á tlf. 31 67 88.

**Reingeringsfólk til Heimarastovu:**
Lýst verður eftir reingeringsfólki til Heimarastovu skjótast til ber í lønarbrøki 0.8.

Arbeiðstíðin er frá kl.08 til 15 gerandisdagar og annaðhvørt vikuskifti frá kl. 09.30 til 13.30.

Starvið er lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Havnar Arbeiðskvinnufelag

Meira fæst at vita um starvið við at ringja til Jóngerð Guttesen, deildarleiðara á tlf. 31 67 88.

Skrivlig umsókn til størvini skulu sendast til :

**Lágargarð**
**Att. Meta av Fløtum, leiðari**
**Stoffalág 84**
**Postboks 1188**
**FO-110 Tórshavn**

**Umsóknarfreist: 5. feb. 2008**

Mangla tit **timburmann** til innrætting av tykkara húsum?

Eg átaki mær alt timburarbeiði/el so sum innrætting av kjallara, lofti og annað timburarbeiði.

Øki: Tórshavn

**Ring á tlf. 57 51 45**

FVE FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ
Faroe Islands Fisheries Inspection

# Eygleiðarar

á fiskiskipum fyri Fiskiveiðieftirlitið

Tvey størv sum eygleiðarar umborð á fiskiskipum, verða hervið lýst leys at seta sum skjótast. Talan er um eitt fast starv og eitt avloysarastarv.

**Starvið fevnir m.a. um hesar uppávur:**

- Skráseta, skriva frágreiðing um fiskiskapin og staðfesta hvar fiskað verður
- Kanna og meta um veiðuna
- Skráseta útblaking, hjáveiðu og veiðu av undirmátsfiski
- Kanna fiskireiðskapin
- Kanna dagbókaføringina
- Kanna veiðu í hvørjum einstøkum háli
- Taka sýnir
- Fylgja við um fylgisveinaeindin er virkin og sambært ásetingunum
- Boða frá møguligum brotum á loyvistreytirnar
- Annað eftirlitisarbeiði

**Førleikakrøv:**

- Fiskivinnutøkningur, ella aðra viðkomandi útbúgving. Fyrimunur, men ikki krav.
- Royndir innan ymiskar veiðihættir
- Heilsuváttan fyri sjómenn.
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli.
- Evnir at arbeiða sjálvstøðugt og óheft.

**Setanartreytir:**
Lønin er sambært stig 35 í tænastumannalønartalvuni. Starvið er tó ikki tænastumannastarv. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar undir tí.

Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheiti er eygleiðari.

Tann ið sett/ur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum, og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 5. feb. 2008 kl. 15:00.

Umsóknir skulu sendast til :

**Fiskiveiðieftirlitið,**
**postsmoga 347, 110 Tórshavn**

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 31 10 65 og tosa við Meinhard Gaardlykke, fulltrúa. www.fisk.fo

# Lastbilførari

Søkt verður eftir lastbilførara at byrja beinanvegin

IR Lastvognar
Tlf. 58 11 26

Lesið Sosialin - so eru tit við